

Løgmaður tosar við norskar politikarar eftir eina oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Men vit sakna nakað meira enn prát og døgurðar, sigur formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vilhelm Johannesen.

# Oljuvinna krevur meira enn fínar døgurðar

– Vit tora líkasum ikki at satsa, av ótta fyri aftur at leypa framav. Men tað nyttar einki bert at ynda seg inn hjá oljufólki við fínum døgurðum. Vit mugu vera upp á vakt, luttaka og seta krøv, sigur formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vilhelm Johannesen.

GEORG L. PETERSEN

Oljufundir og stevnur eru við jøvnum millumbili í Føroyum, og tað tykist, sum føroyingar eru væl kunnaðir um oljuvinnuna. Nakað motsigandi er tó, at føroyska vinnulívið ikki er vitandi um, hvussu nógv virksemi er innan fyri føroyska sjómarkið.

– Eg má viðganga, at vit eru meira upp á vakt nú enn áðrenn og kunnu ikki bara grava okkum niður, sigur formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vilhelm Johannesen.

Hann heldur tað kortini vera eina forklaring upp á, hví føroyska vinnulívið er so varið og ikki rættiliga torir at spenna seg út og krevja treytir settar.

– Vit hava framvegis ikki vunnið á kreppuni og eru í og so varin. Vit eru bangin fyri at vera ov tíðliga úti við treytum, áðrenn vit vita, hvat vit tosa um, sigur hann.

Ein støðugur ótti fyri, at oljufeløgini fara at svíkja, áðrenn svarta gullið er farið at spríkja úr undirgrundini, liggur og lurir.

– Vit vilja ikki missa alt á gólvið enn eina ferð, sigur formaðurin hjá føroysku arbeiðsgevarunum.

Hann heldur tó, at Oljufyrisitingin ger eitt gott arbeiði og altíð letur tær upplýsingar, spurt verður eftir. Eisini hevur FAG sín egna oljubólk, fyri á tann hátt at vera skjótt við nýggjari vitan.

Men tað er ikki altíð nógmikið. Vilhelm Johannesen kundi hugsað sær at fingið enn meira at vitað.

– Oljufyrisitingin hevur røkt sína uppgávu fyrimyndarliga, men tað má havast í huga, at hetta við oljuni er eitt ómetaliga stórt og nýtt øki fyri okkum. Og tað er avmarkað, hvat Oljufyrisitingin megnar, sigur Vilhelm Johannesen, ið ikki vísir tankanum aftur um at víðka Oljufyrisitingina til ein størri stovn.

# Elduvík setir summarhúseigarum nágreiniligari treytir

Í Elduvíkar Kommunu sleppa húsaeigarar ikki undan at fara í pungin eftir pengum til kommunukassan, hóast teir eru skattaborgarar aðrastaðni. Upphæddin er tó ikki av teimum stóru og er í lagi sambært landsstýrismanninum.

GEORG L. PETERSEN

Tað kostar 1.000 krónur árliga í avgjaldi at eiga summarhús í Elduvík. Tað er fyri brúk av gøtulyktum, vegum, ruskbingjum, kloakkum og vatni, stendur í einum brævi til tey, sum hava bústað aðrastaðni enn í Elduvíkar kommunu, men kortini eiga hús har.

Brævið er júst sent út til summarhúseigararnar, sum annars fyrr í ár fingu eitt líknandi skriv, har sama upphædd varð kravd – men tá stóð, at talan var um eitt »summarhúsavgjald«.

Hetta átti kommunan ongantíð at havt skrivað, tí eitt tílíkt avgjald er tað sama sum ein skattur – og skattur kann bert áleggjast við løgtingslóg.

Nú er talan um at krevja gjald fyri tær tænastur, sum kommunan og skattaborgarin rindar fyri í fyrsta umfari. Tað er vatn, renovatión o.a.

Tað hevur hjálpt at skriva brævið umaftur, og annars krevja somu upphædd. Landstsýrismaðurin heldur ikki upphæddina vera meira enn rímiliga.

– Hetta er ikki nakað høgt gjald, og eg kann ikki hugsa mær annað, enn at summarhúseigarar við gleði rinda 1.000 krónur árliga fyri tær nevndu tænasturnar. Tað er heldur ikki meira enn rímiligt, at fólk gjalda, sigur Eilif Samuelsen, landsstýrismaður við kommunumálum.

Hann sær ikki nakran vanda í, at upphæddirnar knappliga verða fleirfaldaðar.

– So má hyggjast at spurninginum út frá einum øðrum sjónarmiði. Tá má farast beinleiðis til summarhúseigararnar og siga, at teir eru óynsktir. Tað hevði lyst meg at sæð, sigur landsstýrismaðurin.



Á bygdaráðsfundi 12.08.´97 var enn einaferð avgjørt at áleggja øllum teimum, ið eiga hús í kommununi, men sum ikki eru borgarar her, at gjalda eitt árligt gjald uppá kr. 1.000,00.
Hetta er fyri brúk av gøtulyktum, vegum, ruskbingjum, kloakkum og vatn.
Tygum vera tí biðin um at síggja burtur frá seinasta brævið okkara um "summarhúsavgjald".
Tað er kommunan, ið viðlíka heldur hesi umráðir, ið øll gera brúk av.

f. Elduvíkar Kommunu

Brævið, sum sent er summarhúseigarunum í Elduvíkar Kommunu

## Yrkingar

### *Vælgagnist føroyingar*

Enn eina ferð eru vit
hildin fyri gjøldur,
ja vit eru snýtt,
lumpað,
lokkað
og reyvrend.
Okkara undirbrotligheit,
dugnaloysi,
ja manglandi innlit
varð okkum at bana.
Á tann skomm,
onkur hevur stolið,
lumpað
og blindað føroyings eygu.
Men skommin er størst
heima hjá okkum sjálvum.

Tann danska stjórnin
og Danski Banki hava kókað
súpan,
sum vit føroyingar gleivbeintir
supu
og svølgdu
uttan at spyrja,
hvat súpan tað var,
og hvør krás var latin í.
Nei, líka løgdu vit í.
Vit vónaðu bert onkran sælan
rús at fá
og royndu sum frægast
at leggja okkum aftur.

Men svøvnurin varð stuttur.
Onkur hevur fingið skriða
og tað í ólukkumát.
Jú,
jú,
súpanin var heldur herskin,
so bróstsviði hevði eisini
gjørt seg galdandi.
Løgtingið sendi ilboð
til Kongens København
og viðlegði resept.
Sjúklingurin skuldi kannast,
dómarakannast.

Men nei
og aftur nei.
Harraboð av fólkatingi kom.
Eingin dómarakanning til
sjúklingin.
Tit kunnu saktans noyðast við
gomul føroysk heimaráð.
Ein súpuskeið av undirbrotlig-
heit,
tvær tablettir av donskum
lygnum
og eitt hálvt krúss av donskum
trælalyndi.
Vælgagnist føroyingar.

Rituvík **EKN**

### *Jákups og Toda kvæði*

Lag: Sigmundarkvæði

Í Danmark, har vóru føroyingar tveir,
Todi og Jákup itu teir.
Fótbóltsmenn, rennið títt á gaggum,
sparkið so, at bóltur fýkur um víðan vøll,
rennið títt á gaggum.

Todi hann kom av Klaksvík frá,
Jákup var av somu vág.
Fótbóltsmenn, rennið …

Jákup fór Herfølge til,
Todi Lyngby tæna vil.

Jákup í bakkan kastaði seg,
bólturin fór tann sama veg.

Jákup í loftið boksar bólt,
klappið, øll hans viðhaldsfólk!

Todi í Lyngby spældi væl,
annað lið hann ynskja skal.

Inn koma dreingir og siga frá:
»Todi er farin til FCK«.

Allir dreingir í markini
slagið stóð í Parkini.

Todi sendi bóltin á flog,
hegnisligt upp um Mogens Krogh.

Eg her siga má farvæl,
men tykkum tað besta ynskja skal,
Fótbóltsmenn, rennið …

**Snorri**

### Verserier

*Berlinmurens fald*

Kommunisme på retur
fik væltet en Berlinermur –
den gyldne frihed frister!
Pakket ind i guldpapir
købes af turister!

Aage H.

Dimmalætting
Tlf. 11212 Fax 10941

# Tónleikur samantvinnaður við kunning um misjón

Norski misjónsfelagsskapurin »Misjon Uten Grenser« við føroyska leiðaranum, Kaj Magnusi Klein fyrireikar í løtuni eina kunningarferð til Føroyar. Á konsertum kring landið er ætlanin samstundis at kunna um arbeiðið hjá hesum víðfevnandi felagsskapi.

SNORRI BREND

– Vit vildu fegin hjálpt einum barni í neyð. Tað kostar »bert« 150 kr. um mánaðin at geva einum barni í Rumenia møguleikan til eitt betri lív.

– Í føroyskum krónum er talan um eina litla upphædd. Men fyri børnini í hesum landinum merkir hetta alt.

Fyrstu vikuna av november mánaði fáa føroyingar eina áhugaverda vitjan úr Noregi, tá gospelsangarin Jan Honningdal kemur higar at hava konsertir kring alt landið.

Tað, sum kortini ger hesa vitjanina áhugaverda, er tað samstarvið, sum er fingið í lag millum hann og norska misjónsfelagsskapin »Misjon Uten Grenser«. Hesin felagsskapur arbeiðir m.a. við at útvega faddrar til børnini í Rumenia og Moldova.

Saman við Jan Honningdal kemur eisini leiðarin í felagsskapinum til Føroyar, nevniliga føroyingurin Kaj Magnus Klein, sum tók við hesum starvinum í vár.

Í løtuni eru 37 føroyskir faddrar útvegaðir til børnini í Rumenia, men vónað verður, at felagsskapurin við hesum framtakinum fer at fáa enn fleiri.



Ein av familjunum, sum Misjon Uten Grenser hevur verið við at hjálpt í Rumenia, er húskið Toma, sum búgva í býnum Cisnadie. Pápin arbeiðir á einum klædnavirki, men løn hansara er ikki nóg stór at forsyrgja familjuni. Við hjálp frá faddrum í Føroyum kann ein geva øllum hesum seks eina ljósari framtíð.

## Lovsangur og kunning

Nú fyrireikingarnar til vitjanina í Føroyum av álvara eru í gongd, er greitt, hvørji øki ætlanin er at vitja og har kunna um víðfevnandi arbeiðið hjá Misjon Uten Grenser.

Lagt er upp til at hava kunnandi fundir á fimm støðum í døgunum 4. til 9. november. Ætlanin er at hava fundir í Runavík, Havn, Klaksvík, Sandoy og í Vágum.

Á skránni hesi kvøld verða tónleikur og lovsangur, sum Jan Honningdal fer at skipa fyri. Gongst sum ætlað, so er ætlanin, at føroyskar sangkreftir eisini skulu luttaka við tiltøkunum tað vikuskiftið, vitjanin varir.

Ein annar partur av hesum fundum er at lýsa víðfevnandi arbeiðið hjá hesum misjónsfelagsskapinum kring allan heimin. Hetta verður gjørt við eini multimedia-framførslu.

Til tess at so nógvir føroyingar, sum til ber, skulu fáa kunnleika til arbeiðið hjá Misjon Uten Grenser, er ætlanin at prenta eitt kunnandi blað, sum skal sendast í hvørt hús í landinum.

Í hesum blaði verður greitt frá endamálinum við felagsskapinum. Men til tess at siga frá, hvussu fólk stuðla arbeiðinum, og hví tey gera tað, verða prentaðar samrøður við tvær føroyskar familjur, sum eru faddrar at børnum í Rumenia.



Kaj Magnus Klein hevur síðani í vár verið leiðari av norska misjónsfelagsskapinum. Nú fyrireikar hann eina kunningarferð í Føroyum.

## Víðfevnandi arbeiði

»Misjon Uten Grenser« er ein partur av einum øðrum altjóða felagsskapi, Mission Without Borders, sum varð stovnaður í 1960. Í Noregi byrjaði arbeiðið fyri 15 árum síðani.

Endamálið við felagsskapinum er at vera eitt bindilið millum tey trúgvandi í Vestur- og Eysturеuropa, fyrrverandi Sovjetsamveldinum og í Kina.

Arbeitt verður m.a. við at geva Bíbliur og kristiligar bókmentir til menniskjur í neyð, men í eins stóran mun at geva mat, heilivág og annað til familjur, børn, meinigheitir og onnur, ið tørv hava á slíkum.

Ein annar partur av hesum arbeiði er at útvega faddrar til børnini í t.d. Rumenia, og er hetta arbeiðið skipað undir eini serstakari deild, við tí endamáli at hjálpa børnunum bæði materielt og andaliga.